MENTANARGRUNNUR LANDSINS

Tórshavn, 14. oktober 2026
Tíðindaskriv frá Mentanargrunni Landsins

14 filmsverkætlanir fingið stuðul

Nevndin í Mentanargrunni Landsins hevur tikið avgerð um at veita 14 verkætlanum stuðul við einari samlaði stuðulsupphædd á 1,5 mió. kr.

Hesa ferð komu 36 umsóknir inn, og søkt varð um 5,4 mió. kr. tilsamans.

Endamálið við stuðulsjáttanini er at framleiða og menna føroyskan film við denti á fiktiónsfilm, heimildarfilm, animatiónsfilm og listafilm. Einstaklingar, bólkar og feløg kunnu søkja um stuðul til ymsar tættir innan filmsgerð.

Nevndin hevur viðgjørt umsóknirnar eftir ásetingunum í løgtingslóg nr. 60 frá 17. mai 2005 um stuðul til mentan og list v.m., sum er broytt við løgtingslóg nr. 45 frá 15. mai 2014, løgtingslóg nr. 34 frá 30. apríl 2015 og kunngerð nr. 3 frá 6. januar 2025.

Til at meta um umsóknir og gera tilmæli til nevndina, hevur grunnurin sett tveir filmsráðgevar, eftir tilmæli frá faknevndini fyri film. Avgerðin hjá nevndini um hvør fær stuðul til film, er bygd á tilmæli frá ráðgevunum.

Samlaða filmsjáttanin fyri 2026 eru 6,6 mió. kr. Stuðul til film verður veittur fýra ferðir árliga.

Til stuðulsumfarið Film III. 2026 er avgjørt at veita hesum 14 filmsverkætlanunum stuðul:

Verkætlanarheiti	***Slag av filmi***	***Umsøkjari***	***Upphædd*** **kr.**
Anny	Heimildarfilmur	Bad Weather Projects v/Duritu Sumberg Poulsen	70.000
Sodomitturin	Spælifilmur	Durita Sumberg Poulsen	80.000
UFO - er nakar har úti?	Heimildarfilmur	Hugmynd v/Drós í Ólavsstovu	50.000

Dýpir av tíð	Heimildarfilmur	Gunnleygur Clementsen	19.000
Menniskja	Heimildarfilmur	RVH Productions v/Rúnu V. Højgaard	250.000
Into the Heart	Spælifilmur	Outlier Projects v/Jón Hammer	50.000
Av himni	Stuttfilmur	Outlier Projects v/Jón Hammer	99.000
Oceancraft	Heimildarfilmur	Outlier Projects v/Jón Hammer	150.000
Det vi ikke når i dag	Spælifilmur	Outlier Projects v/Jón Hammer	70.000
Ung í føroyskum dansi	Heimildarfilmur	UFO v/Rakul Ró Steintórsdóttir	80.000
Ekko af et Kollaps - 93	Heimildarfilmur	Tambo Film ApS v/Rikke Tambo Andersen	80.000
Semd	Heimildarfilmur	Frælsisfilmar ÍV/F v/Jan Lamhauge	190.000
Lovaða Land	Heimildarfilmur	Cinema Polaris v/Anton Petersen	99.000
Hatta tosa vit ikki um	Heimildarfilmur	DokFo v/Lucas Frayssinet	200.000